

*Allahagannakonsertin í 1959 var hin seinasta, har Edith stjórnaði kórinum. Myndin er tikin hetta sama heystið.*
*Aftast: Niels, Torkil, Petur, Jákup, Poli, Alfred, Otto, Osvald, Erland, Sivar, Karl og Henry.*
*Miðraðið: Jonhild, Anny, AnneMia, Jonhild, Marna, Mia, Herborg, Paula, Alfrida, Saloma, Selma, Inga og Elna.*
*Fremst: Edith, Ruth, Ginna, Vera, Jonna, Margretha og Magda*



*Brúðarparið Edith og Jákup Dahl*



*Jákup og Edith á Noregsferð*

skránni: "Harra Guð, títt dýra navn og æra…". Á heimleiðini fóru tey umvegis Svøríki til Danmarkar. Har vitjaðu tey m.a. Danmarks Statsradiofoni og sungu upp á plátu.

Óteljandi vóru útferðirnar hjá kórinum um sumrarnar, til gongu niðan í hagan, í bili og í báti, báði her í Suðuroynni og norðanfjørðs. (Hanna Lisberg, sum sang við í mong ár, minnist t.d. eina ferðina, tey fóru til Sumbiara í lastbilinum hjá Missinum.)

Edith plagdi at siga við kórið, tá ið tey skuldu taka sær av løttum: "Sjóðið tykkum saman!"

Og samanhald og trúfesti eyðkendi alt virksemi hjá kórinum.

Allahagannakonsertin í 1959 var hin seinasta, har Edith stjórnaði kórinum.

Í Trúboðanum (nr. 2 februar 1960) skrivaði Johannes Andr. Næs, sum búði í Vági um hetta mundið og var kórinum ein hollur stuðul:

*Minnisorð – Edith Dahl til áminningar.*

*Eftir drúgva sjúkralegu andaðist Edith Dahl 9. januar.*

*Fyrst tá ið Edith fekk varhugan av, hvussu álvarsama sjúku, hon hevði, fall tað henni óivað tungt at vita, at hon nú skjótt skuldi skiljast frá øllum tí, hon elskaði her á jørð. Hon hevði stórt heim at fara frá: mann og fimm børn.*

*Men sum tann kvinna, ið legði alt sítt í Harrans hond, so dugdi hon so væl at fara frá øllum, at hon við sjúkralegu og deyða sínum kemur at standa sum eitt talandi vitni um hetta: at doyggja í Harranum.*

*Hon hevði nógv at fara frá báði í heimi sínum, í kirkjuni og í bygd síni sum heild.*

*Og í øllum hesum livdi hon í Harranum. Tað var gudstrúgv hennara, sum var drívkraftin í øllum tí, hon var við í, meinigheitini og bygdini at gangi. Hon var altíð fús at gleða og gagna.*

*Nógv tóm plás standa nú eftir hana. Fyrst av øllum er at nevna heimið, sum hevði so nógv brúk fyri eini mammu og eini húsmóðir. Men vit kunna eisini nevna virksemi sum t.d. sunnudagsskúlan, Sunnudagsblaðið, limur í meinigheitsráðnum, í skúlanevndini, í stýrinum fyri K.F.U.K., í húsmøðrafelagnum, í sjómansringinum og so var hon í fremstu røð, tá ið Kirkjukórið Ljómur í 1939 varð stovnað. Kórið hevur hon leitt sum sangstjóri hesi 20 árini við einum sjáldsomum trúskapi og kærleika.*

*Hon spardi seg sjálva ongantíð, og allarminst til sangvenjing, sum heim hennara altíð stóð opið fyri. Og heim hennara var altíð opið. Øll vóru vælkomin. Blíðskapur og hjartalag vóru eyðkenni hennara.*

*Við Ljómi hevur hon gjørt væleydnaðar og vælfagnaðar sangferðir um oyggjarnar. Eisini sera væleydnað og fagnað var sangferðin hjá Ljómi í 1954 til Noregis og Danmarkar. Jú, dugur var í Edith Dahl, og hon átti ídni, sum vit mega undrast á. Hon bregdi ikki burtur úr ætt, dóttir Magnus Dahl, keypmann.*

*Vit sakna hana stórliga ímillum okkum. Vágsbygd saknar hana. Vit eru blivin eitt stórt og sterkt fólk fátækari.*

*Minnið um Edith Dahl – hana, sum var so upptikin av tí lívi, hon stóð mitt í, hana, sum var so upptikin av nýggjum hugskotum til at seta í verk í framtíðini – minnið um hana verður okkum nógv størri og dýrari av tí, at vit, sum stóðu henni nær, vóru vitni til, hvussu avbera væl hon kortini dugdi at leggja alt hetta frá sær – alt tað, sum rustur og mølur kunna eta. Mitt í lívsins baksi var hon ferðabúgvin at fara inn í teir ævigu bústaðir.*

*Ærað veri minnið um Edith Dahl!*

Sunnudagin 30. novembur fara okur at minnast hesa undangongukvinnu við einari minningargudstænastu. Hvør veit, um ikki sangurin "Nógv fagrari, fríðari..." og aðrir av teimum góðu, gomlu úr Grønu Bók hjá Ljómi fara at "tóna" undir kirkjuhválvinum til heiðurs fyri undangongukvinnuna og fyrrverandi kórleiðara okkara, Edith Dahl.



*Tær 4 pláturnar, sum vóru upptiknar í Klaksvík í mai 1953*